







# Søga og hugni hond í hond

**Tað var lítið menn-iskjansligt yvir upp-havsmanninum til Helnan Phønix Hotel. Hann var ein tyrannur, sum fór illa við bæði trælum, bøndrum og sjálvt sínari egnu konu. Men tað er einki við søguliga og hugnaliga hotellinum, sum á nakran hátt gevur ábendingar um, at hotellið í sínari tíð hýsti trælum í kjallaranum**

Tá Brigader William von Halling í 1770 kom heim aftur úr India, hevði hann við sær bæði ríkidømi og trælir. Hann var ein plága fyri grannalagið og fór ógvuliga illa við bæði trælum og bøndrum – ja, sjálvt hansara egna kona fekk av at vita.

Hann keypti sær heitið Brigader og keypti seg eisini seinni til aðal-heiti. Kostnaðurin var so høgur, at Danmarks kongur fyri peningin kundi steinseta Kongens Nytorv í Keypmannahavn.

Brigaderurin gjørdi av, hvørjum bøndir hansara skuldu gifta seg við, og hann kravdi sjálvur at halda brúðarnáttina saman við brúðurini. Hetta førdi til, at fleiri drápsroyndir vórðu framdar móti honum, og tá hann endiliga doyði, streymaðu bøndir til jarðarferðina at vissa sær, at hann veruliga var deyður.

Men áðrenn tað – í 1783 – bygdi hann sær bústað í Aalborg á tí staðnum, sum nú eitur Brigader Hallings Palæ. Palæ'ið er í dag friðað í A-flokkinum.

* * *

Í 1853 varð Brigader Hallings Palæ inrættað til Hotel Phønix – Aalborg. Hotellið er uppkallað eftir heilaga »Fuglinum Phønix«, ein undurfuglur, sum stóð upp aftur eftir ein eldsbruna í Sóltemplinum í Heliopolis, fyri síðani at rýma úr Egyptalandi.

Hotel Phønix hevur gjøgnum tíðina havt stóran týdning fyri søguna hjá Aalborg. Hotellið hevur verið karmur um nógvar týðandi hendingar, eins og fleiri statsleiðarar og aðrir kendisar hava verið gestir á hotellinum. Hotellið er drivið víðari við Brigader Hallings Palæ sum væl varðveitti kjarnin, við mongum virðismiklum listaverkum frá teirri tíðini, eins og fleiri av vøkru hallunum á hotellinum eru nevnd eftir honum. Hotellið hevur eisini latið Historisk Museum og Kunstakademinum fleiri virðismiklar lutir.

Júst 200 ár eftir, at Brigader Halling bygdi sítt palæ, varð tað yvirtikið av Helnan International Hotel, sum er stovnað av stjóranum, Enan Galaly. Hann varð føddur í Heliopolis, har »Fuglurin Phønix« reis upp.

Slagorðið hjá Brigaderinum var »Forward«, og tað er aftur tikið í nýtslu. Hotellið hevur fingið umfatandi um- og útbygging, so tað í dag er eitt fyrsta floks altjóða hotel við framkomnum fasilitetum.

Hotellið er hitt største og søguliga elsta í Aalborg við 210 rúmum, parkeringsplássi, veitslu- og fundarrúmum umframt matstovu og barr. Eisini hevur hotellið Wellness deild og svimmingpool.